LØGMANSSKRIVSTOVAN

Innanhýsis
Tórshavn, tann 7. des. 2023
J.Nr.: 23/18344
(at tilskila í svari)

Viðgjørt:

Upprit um innkomnar viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum sjórættur)

Uppskotið varð sent til hoyringar tann 2. oktober 2023 hjá viðkomandi myndugleikum og feløgum. Hoyringsfreistin var tann 14. november 2023.

Hesir myndugleikar og feløg fingu uppskotið til hoyringar:
Umhvørvismálaráðið, Løgmálaráðið, Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, Umhvørvisstovan, Vørn, Landsverk, Vinnustovnurin, Sjóvinnustýrið, Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Vinnuháskúlin, Kommunufelagið, Arktisk Kommando, Ríkisumboðið, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Maskinmeistarafelagið, Føroya Fiskimannafelag, Føroya Reiðarafelag, Vinnuhúsið.

Uppskotið hevur eisini ligið frammi til hoyringar á hoyringarportalinum.

Hesir myndugleikar og feløg hava sent inn hoyringarsvar til uppskotið:

- Umhvørvismálaráðið
- Fjarskiftiseftirlitið,
- Vørn,
- Heilsufrøðiliga Starvsstovan,
- Sjóvinnustýrið
- Føroya Reiðarafelag
- Maskinmeistarafelagið
- Føroya Fiskimannafelag,
- Søfartsstyrelsen

Fjarskiftiseftirlitið, Vørn og Heilsufrøðiliga Starvsstovan svaraðu, at stovnarnir ikki hava viðmerkingar til uppskotið.

Søfartsstyrelsen svaraði, at Statsministeriet, Udenrigsministeriet, Forsvarsministeriet og Søfartsstyrelsen ongar viðmerkingar hava til uppskotið.

Viðmerkingar frá Løgmansskrivstovuni til innkomnu viðmerkingarnar:

Umhvørvismálaráðið
Umhvørvismálaráðið vísir á, at tað hevur týdning sum skjótast at fara undir arbeiðið at lýsa, hvørjar fyrisitingarligar og fíggjarligar avleiðingar yvirtøkan av sjórættinum hevur fyri føroyska sjóvinnuumsiting í breiðari merking. Víst verður á, at Føroyar hava nógvar altjóða skyldir sum flaggland, og at tað er umráðandi, at uppgávu- og ábyrgdarbýtið er væl lýst, og at málsøkini

verða skynsamiliga býtt millum landsstýrisfólkini. Eisini verður víst á týdningin av, at sjóvinnuumsitingin verður raðfest fíggjarliga og fyrisitingarliga.

Viðmerkingar Løgmansskrivstovan
Yvirtøkan verður sambært uppskotinum tann 29. juli 2025. Uttanríkis- og vinnumálaráðið er saman við Sjóvinnustýrinum og Søfartsstyrelsen farið undir arbeiðið at dagføra sjólógina, so lóggávan er dagførd innan yvirtøkuna. Eisini verður arbeitt við at lýsa málsøkið meira nágreiniligt, so tað verður heilt greitt, hvørjar uppgávur føroyskir myndugleikar yvirtaka, so føroyska sjóvinnuumsitingin á yvirtøkudegnum er klár at røkja tær fyrisitingarligu uppgávurnar sambært sjólógini.

Í uppskotinum verður lagt upp til, at fyrisitingin verður uppraðfest við 2 ársverkum í sambandi við yvirtøkuna. Lagt verður upp til, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið fær játtan til 1 ársverk í 2024, og at Sjóvinnustýrið fær játtan til 1 ársverk í 2025.

Sjóvinnustýrið
Sjóvinnustýrið vísir á, at orðingar í niðasta broti í pkt. 1.3 og 1.7 í uppskotinum viðvíkjandi IMO góðkenning ikki eru rættar ella kunnu misskiljast.

Víst verður á, at peningur má setast av á fíggjarlógini til at røkja altjóða samstarvið, so samstarvið kann halda áfram, hóast málsøkið verður yvirtikið.

Viðmerkingar Løgmansskrivstovan
Viðmerkingarnar eru tiknar til eftirtektar, og nýggj orðing er skrivað.

Viðvíkjandi játtan á fíggjarlógini skal verða víst á, at tað uppskotinum verður lagt upp til, at peningur verður játtaður á fíggjarlógini til 2 nýggj ársverk.

Føroya Reiðarafelag
Føroya Reiðarafelag hevur ongar ítøkiligar viðmerkingar til lógaruppskotið.

Felagið vísir á, at málsøkið er umfatandi og torgreitt, og at tað hevur stóran týdning fyri virksemið hjá fiskiskipum, og tí má yvirtøkan fyrireikast væl og fremjast á skynsaman hátt. Víst verður á, at broytingar, sum verða gjørdar í sambandi við yvirtøkuna, eiga at verða fyrireikaðar væl og sendar í hoyring í góðari tíð. Føroya Reiðarafelag ynskir at vera partur í fyrireikingunum at yvirtaka málsøkið.

Viðmerkingar Løgmansskrivstovan
Ein av orsøkunum til, at sjálvt yvirtøkutíðspunktið er um 1½ ár er júst við tí fyri eyga, at umsitingin skal fáa stundir til at fyrireika yvirtøkuna og at stundir skulu vera til at dagføra lógina innan yvirtøkuna. Uttanríkis- og vinnumálaráðið miðar ímóti at leggja uppskot til kongaliga fyriskipan um broyting í sjólógini fyri Løgtingið á heysti 2024, og áðrenn hetta uppskot um dagføringar av sjólógini verður lagt fyri Løgtingið verður tað við hóskandi freist sent øllum viðkomandi pørtum til hoyringar.

Maskinmeistarafelagið
Maskinmeistarafelagið tekur undir við, at málsøkið verður yvirtikið, men felagið tekur ikki undir við tí, sum stendur í uppskotinum viðvíkjandi fíggjarligu og umsitingarligum avleiðingum av yvirtøkuni. Felagið metir, at tað í sambandi við yvirtøkuna eiga at verða sett í minsta lagi 7 størv, og at í minsta lagi 3 størv verða sett á Sjóvinnustýrinum. Sambært sannføringini hjá

Maskinmeistarafelagnum skal íløga gerast í nýggja vitan á økinum hjá Sjóvinnustýrinum, somuleiðis skal núverandi servitan á økinum haldast við líka.

Viðmerkingar Løgmansskrivstovan
Í lógaruppskotinum er greitt frá fíggjarligu og umsitingarligu avleiðingunum fyri tað almenna í sambandi við yvirtøkuna av málsøkinum. Fyri tað almenna merkir yvirtøkan, at almenna umsitingin aftaná yvirtøkuna skal loysa hesar uppgávurnar:

- lógarfyrireikandi arbeiði,
- luttøku í altjóða samstarvi
- og aðrar uppgávur, sum heilt ella partvís eru inntøkufíggjaðar.

Sjólógin inniheldur reglur um fíggjarrættin á sjónum. Sjólógin regulerar sostatt í høvuðsheitum viðurskifti millum privatar partar í samband við sigling. Í sjólógini liggja ikki nógvar fyrisitingarligar uppgávur fyri tað almenna. Sjórættur er løgfrøðiliga eitt rættuliga komplekst øki, og í sambandi við dagføringar av lóggávuni verða gjørdar í samstarvi millum Norðurlondini, og í flestu førum verða broytingar gjørdar við støði í altjóða sáttmálum, sum eru samtyktir í IMO. Uttanríkis- og vinnumálaráðið og Sjóvinnustýrið luttaka longu í dag í IMO, og væntað verður, at umsitingin aftaná yvirtøkuna fer at samstarva við eitt nú umsitingina í Søfartsstyrelsen, tá nýggjar reglur skulu setast í gildi innan økið.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur mett, at tað verður neyðugt at fáa játtan til 2 ársverk í sambandi við yvirtøku av málsøkinum. Viðmerkingar Maskinmeistarafelagsins hava ikki ført til broytingar í tí partinum av uppskotinum, har greitt verður frá fíggjarligu og umsitingarligu avleiðingunum av yvirtøkuni.

Føroya Fiskimannafelag
Føroya Fiskimannafelag hevur onga viðmerking til innihaldið í uppskotinum.
Felagið vísir á, at tað er ein avgerandi fyritreyt fyri yvirtøkuni at neyðug fyrisitingarlig orka verður sett av nú og í framtíðini soleiðis, at lógarverkið kann verða nøktandi dagført og at føroysk sjóvinna og sjófólk ikki verða sett í verri støðu orsakað av yvirtøkuni.

Viðmerkingar Løgmansskrivstovan
Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur mett, at tað verður neyðugt at fáa játtan til 2 ársverk í sambandi við yvirtøku av málsøkinum. Viðmerkingar Fiskimannafelagsins hava ikki ført til broytingar í uppskotinum.